# Øll áttu at rudda fyri seg

**Leygardagin endaði umhvørvisátakið hjá Klaksvíkar kommuna við almennum ruddingardegi. – Um hvør ruddaði upp eftir seg, hevði verðið nossligt her hjá okkum, sigur tann eini ruddarin, Jósup Davidsen á Norðoyri**

UMHVØRVI
*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** - Herúti er nóg mikið av óruddi at finna, sigur Jósup Davidsen, sum upprunaliga er ættaður av Skála.

Í góðveðrinum leygardagin var hann farin útum eina góða løtu at rudda í bygdini, nú kommunan sjálv ynskti at gera nakað fyri umhvørvið í býnum.

Um middagsleitið ruddaði hann í einum løki í nánd av húsum sínum. Beint við hevði hann ein lastbil, har hann legði alt óruddið frá sær.

Hóast ruddingardagar hava verið áður í kommununi, tyktist vera nóg mikið at rudda og taka upp.

- Ja, eg royni at taka tað ringasta burtur úr ánni, sigur Jósup Davidsen við Sosialin.

Jósup er ættaður av Skála, men býr nú á Norðoyri. Hann koyrir tó hvønn einasta dag út til heimbygdina, har hann arbeiðir sum bakari.



*- Um hvør ruddar hjá sær sjálvum, verður nossligt, sigur Jósup Davidsen á Norðoyri*

### Uppí tvær lastir

Um morgunin henda leygardagin var Jósup farin frá húsum fyri at hjálpa kommununi at rudda.

Orðatakið sigur jú, at ein kann gera sjálvt tann størsta býin gullreinan eftir bert hálvum tíma, um hvør ruddar fyri síni egnu hurð.

Líkt varð til ungi skálamaðurin var ein teirra sum gekk inn fyri hesum: Umframt tað at hann ruddaði í bygdini, har hann nú býr, ruddaði hann samstundis í hesi lítlu ánni beint við hús síni her á Norðoyri.

- Jú, her er í øllum førum nóg mikið at taka upp, sigur hann.

Fyrr um morgunin hevði hann fylt eina ferð uppí tann lítla lastbilin við óruddi aðrastaðni frá í bygdini, og nú var hann í ferð við at fylla ta næstu billastina.

Her var alskyns órudd at finna í ánni, og tí var skjótt at fylla lastina einaferð aftrat.

- Eg vænti, at eg fylli hesa lastina aftrat, og so eri eg liðugur fyri dagin, sigur Jósup Davidsen.

### Einki undantak

Klaksvíkar kommuna hevur í lýsingum sínum gjøgnum mong ár víst á tann týdning, sum umhvørvið hevur fyri næststørsta bý okkara.

Orðafellið »Reinur og fríður – Klaksvíkar býur« er eisini ein partur av tí umhvørvisátakinum, sum í farnu viku sermerkti býarlívið.

Leygardagin var so seinasta tiltakið í hesum sambandi, tá borgararnir í kommununi sluppu út at rudda ymsastaðni í býnum, samstundis sum møguleiki var at ogna sær ein plantupakka.

Jósup er sjálvur fegin um hetta átakið hjá kommununi, tí sum hann sigur:

- Tað er altíð nóg mikið av óruddi at síggja her í kommununi. Og herúti á Norðoyri er einki undantak í so máta!

### Hvør ger sítt

Fáar metrar frá húsum hansara rennur ein løkur. Og tað var í hesi ánni at Sosialurin fekk orð á ídna ruddarin.

- Eg royni at taka tað ringasta burtur úr, sigur Jósup Davidsen.

Í lítlu ánni fann hann bæði plastikk, hjólskálir, timbur, dunkar, nógvar fløskur og mangt annað sum fólk hava tveitt burtur – á skeivum staði!

Jósup var sjálvur á blettinum klokkan 10 henda morgunin, samstundis sum almenni ruddingardagurin var settur í gongd.

Eitt tað fyrsta hann gjørdi var at rudda fyri egnari hurð:

Tey hava nakrar seyðir gangandi á eini trøð í nánd av húsunum. Áðrenn hann ruddaði í ánni hevði hann verið á stykkinum og í eini aðrari á at rudda plastikk og annað burtur.

- Eg hevði ynskt at fleiri tóku lut í hesi ruddingini, tí sovítt eg dugi at síggja skuldi verið nóg mikið at tikið av, sigur ídni skálamaðurin.

Og hann leggur aftrat:

- Um hvør ger sítt, so hevði tað verið nossligt her í bygdini!

---

# Ruddingardagur – javel?!

**Hóast býráðslimirnir sjálvir gingu undan. Hóast væl hevur verið kunnað um ætlanina. Og hóast faldari er sendur í hvørt hús í kommununi, bendi nógv á, at fólk vistu sera lítið um umhvørvisvikuna í Klaksvík**

Ó-RUDDING
*Snorri Brend*
*snorrisosialurin.fo*

**Klaksvík:** Tað skortaði ikki við viðmerkingum frá borgarunum til serstøku umhvørvisvikuna hjá Klaksvíkar kommunu.

Fyrrapartin leygardagin var nevniliga ikki nógv sum bendi á, at øll kommunan skuldi rudda og tryggja, at Klaksvík framvegis verður bæði reinur og fríður.

Ein koyritúrur gjøgnum stóran part av býnum vísti fá tekin um, at rudding og trivnaður vóru í hásæti.

Onkur vaskaði bil, onkur málaði garð, onkrastaðni sóust menn práta og børn spæla. Og kring fótbóltsvøllin var ein rættiliga stór mannamúgva komin at hyggja eftir einihvørjari fótbóltskapping.

Men tað var rættiliga langt millum ruddandi fólk í handskum og við posa á baki.

Kanska var kunningin ov lítið og arbeiðið at fáa fólk við uppá tiltakið ikki nóg væl úr hondum greitt. Og alt hetta, hóast alt er gjørt fyri at lýsa við tiltakinum.

### Rudda á røttum staði

Fólk høvdu góða tíð at práta, og her gekk sjón fyri søgn, at hetta við ruddingini hevði ikki tann stóra áhugan millum tað vanliga fólkið.

- Nå, er tað í dag er tað er ruddingardagur! Nei, tað visti eg ikki, segði ein maður.

Tann næsti var púra ovfarin, og spurdi um tað var í dag at ruddingardagurin var?

- Ein einstakur dagur at rudda her í Klaksvík er alt ov lítið. Her mugu nógvir dagar til, tí her liggur órudd og sløðist allastaðni, segði ein annar.

- Eg haldi, at tær mongu fyritøkurnar í býnum áttu at rudda rundan um hjá sær sjálvum fyrst. Far tú bara ein túr út eftir Oyrarvegnum, so er nóg mikið órudd har til fleiri dagar, segði ein triði.

Og ein fjórði var so opinskáraður, og helt at skuldi ein veruliga rudda í Klaksvík, so átti ein at byrja í einum stórum gráum bygning í Nólsoyar Pállsgøtu!

Hinvegin visti onkur at siga frá, at nógv fólk høvdu ruddað í Vágsbønum í góðveðrinum henda morgunin.

### Hugsa globalt

Tað er umhvørvisdeildin hjá kommununi sum hevur staðið fyri hesum umhvørvisátakinum teir seinastu dagarnir.

Tað byrjaði so væl við at fólk í umsitingini sjálvi tóku fyrsta stigið og fóru at rudda í Borðoyarvík. Seinni ruddaðu tey innanveggja í arbeiðsplássi teirra.

Ynskið hjá kommununi var eisini at fáa fólk at taka undir við hesum, og tí var ein faldari sendur út í hvørt hús, har greitt var frá umhvørvisvikuni.

Í hesum faldara greiddi borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen frá endamálinum við hesum átakinum, nú tann nýggja umhvørvisdeildin er sett á stovn.

Hann vónaði, at hvør einstakur borgari fór at taka væl undir við teimum nýggjutónunum, og verkætlanunum, ið eru á veg á umhvørvisøkinum.

- Vit eiga og mugu hugsa globalt, nú heimurin er